# Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Faroe Employers' Association**

Vinnumálaráðið
Postsmoga 64
FO-110 Tórshavn

Att.: Arne Poulsen

Tórshavn 5. februar 2007

Okkara tilv./Our ref.:
2-2127/Jan Mort/Vinnum-FAG-B-V
Tykkara tilv./Your ref.:

## Viðmerkingar til uppskot um nýggja kappingarlóg

Kappingarlógin hevur nú virkað óbroytt í 10 ár, sjálvt um tað í viðmerkingunum til lógina frá 1997 stendur, at lógin skuldi endurskoðast eftir eitt ár.

Seinastu árini eru øll londini í ES og EBS farin yvir til somu lóggávu á hesum øki. Lóggávan byggir, eins og hetta uppskotið, á ein forboðsleist, meðan verandi lóg sum byggir á eftirlit.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er av tí áskoðan, at vinnulóggáva í Føroyum eigur at vera á altjóða støði. Tí hava vit tikið undir við at t.d. partafelags og roknskaparlógir vera dagførdar. Tað sama ger seg galdandi fyri kappingarlóggávu. Vit eru av tí áskoðan at henda skal fylgja rákinum í umheiminum, og tí taka vit undir við uppskotinum.

Vit fegnast um at lógaruppskotið í aðru umbering er rætta, so at grein um kappingaravlagandi almennan stuðul nú er tikin við. Tí tá tátta verður í fyri at tryggja at kappingin millum fyritøkur er frí og rættvís, er tað av stórum týdningi at almenni geirin ikki avlagar kappingina, og her er enn langt á mál.

Greinin um kappingaravlagandi stuðul kann hava týdning fyri t.d. tænastuvinnu, men neyðugt er at bæði landsstýri og løgting hava fyri eyga, at meira skal til fyri at tryggja almenna avlagan av kappingini. Neyðugt er at vit sum skjótast fáa reglur alment keyp og alment útboð av keypi yvir ávíst mark. Eisini er neyðugt at kommunulógin verður fylgt upp við nærri reglum sum tryggja at andin í lógini eisini virkar í praksis. Eisini lisitatiónslógin krevur ábøtur, um kappingin skal virka og sleppast skal undan fjaldum stuðli.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vil mæla til at tað beinan vegin verður fari undur at fáa til nevndu reglur um almenna kappingaravlegan til vegar. Mælt verður til at gildiskoma á nýggju kappingarlógini verður sett soleiðis, at umrøddu reglur fyri tað almenna verða settir í verk samstundis sum nýggja kappingarlógin.

Tá uppskot til nýggja kappingarlóg var lagt fram fyri 2 árum síðani vístu vit á, at ein forboðslóg eftir ES leisti fór at krevja meira orku í kappingarumsitingini, um ikki rættartrygdin hjá vinnuni

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Smærugøta 9A • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

skuldi koma í vanda. Vit vilja tí enn einaferð vísa á hesi viðurskiftir: Um størri umsitingarlig orka ikki verður sett av, eigur nýggja lógaruppskotið ikki at verða sett í verk.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Jan Mortensen